**Fiskirannsóknarstovan**

# Royndir eftir mathøgguslokki

**Royndir gjørdar við M/tr Mýlingi í kantinum á Føroyabanka í des. 2003 og jan. 2004**

FRS smárit 01/2004

# Royndir eftir mathøgguslokki

Royndir gjørdar við M/tr Mýlingi í kantinum á Føroyabanka í des. 2003 og jan. 2004

Tíðarskeið: 1/12 2003 – 30/1 2004.

Ábyrgd: Kristian Zachariassen.

Við fyri FRS: Kristian Zachariassen.

Skrivað frágreiðing: Kristian Zachariassen.


**Samandráttur:**
Mathøgguslokkur, *Loligo forbesi*, er ávísar árstíðir at fáa í kantinum á Føroyabanka, serliga eystara kanti. Hesin høgguslokkur hevur vanliga góðan prís, men trupulleikin er, at hann ikki fæst við einum vanligum trolposa, sum er 135 mm ella 145 mm, tí hann fer ígjøgnum meskarnar. Neyðugt er tí at hava smærri meskar, um hann skal fáast. Tá smærri meskar verða nýttir, er altíð vandi fyri at meira av óynsktari hjáveiðu verður í saman við veiðuni. Tí varð roynt at hava skiljirist í trolinum fyri at sleppa av við so stóran part av óynsktu hjáveiðuni sum møguligt.
Við at nýta hesa skiljirist í trolinum, var møguligt at sleppa av við ein stóran part av hjáveiðuni, sum serliga var smáhýsa. Tó um hýsan er alt ov lítil, so er ikki møguligt at skilja hana frá høgguslokkinum. Hetta vísti seg tó ikki at vera nakar trupulleiki, Tá roynt verður mest ímillum 250 – 300 m, er meginparturin av hýsuni størri enn 35 cm, sum møguligt er at skilja frá við rist.
Høgguslokkur kann vera eitt gott íkast afturat tí vanligu veiðuni, tí hann hevur vanliga góðan prís, omanfyri 20 kr/kg. Sum dømi kann nevnast, at tann eina túrin vóru 4 tons av høgguslokki seld fyri 88.000 kr. meðan 40 tons av upsa vórðu seld fyri 97.000 kr. Tað vil siga, at henda túrin var prísurin á høgguslokki 9 ferðir prísin á upsa.




*Mynd 1: Tóv hjá M/tr Mýlingi eftir høgguslokki.*

M/tr Mýlingur gjørdi 4 túrar íalt. Tveir túrar í desembur og tveir í januar 2004. Fiskiskapurin í desembur og í byrjanini av januar var brúkiligur, men minkaði so burtur í næstan einki. Veiðan tveir teir fyrru túrarnar var uml 8,5 tons hvønn túrin, tann 3. túrin uml 4 tons og tann 4. uml 1,5 tons av høgguslokki. Prísurin var 13,70 og 14,50 fyri kg tveir teir fyrru túrarnar og 22,00 til 32 fyri kg báðar teir seinnu túrarnar. Veiðan varð seld í Scrabster.

Royndir hava verið gjørdar eftir hesum høgguslokki fyrr. Millum annað hevur fiskirannsóknarskipið Magnus Heinason gjørt nakrar túrar og M/tr Beinta gjørdi nakrar túrar, til hon varð seld fyri nøkrum árum síðani.
Hagtøl frá veiðuni hjá teim eingilsku trolarunum, áðrenn fiskimarkið varð flutt út, vísa, at ein góður partur av veiðuni viðhvørt var mathøgguslokkur, serliga tá teir høvdu roynt á Føroyabanka. Mest av høgguslokki var í veiðuni hjá teimum í oktobur – novembur og í juni – juli, um summarið tó minni enn um veturin.

**Endamál:**

Endamálið við royndunum var at fiska eftir mathøgguslokki, *Loligo forbesi,* í kantinum á Føroyabanka. Fiskað hevur verið eftir hesum høgguslokki fyrr, millum annað hevur Magnus Heinason gjørt nakrar túrar og M/tr Beinta hevði eisini eitt royndarloyvi, sum áður nevnt. Ein av trupulleikunum var, at tað kundi vera væl av smáhýsu í trolinum. Tí varð roynt at hava rist í trolinum fyri at sleppa av við hesa smáhýsu.

**Útgerð og framferðarháttur:**

M/tr Mýlingur er lemmatrolari 299 BRT til støddar og hevur ein Vickman 883 Kw motor. Hann er í skipabólki 1.

Útgerðin, hann nýtti, var tann sama, sum tá hann er til vanligan fiskiskap, tó nýtti hann eina skiljirist í trolinum og hevði tveir posar til veiðuna. Annar posin varð festur aftanfyri ristina, so alt, sum fór gjøgnum ristina, kom í hann. Hin posin var festur omanfyri ristina, so alt, sum ikki fór gjøgnum ristina fór í hendan posan. Meskarnir í báðum posunum vóru 80 mm.

Útgerðin , sum nýtt varð, var henda.

| | |
|---|---|
| Trol: | Stjørnutrol 376 meskar í 200 mm |
| Forleingjarar: | 60 m wire |
| Yvirbreidlar: | 30 m wire |
| Undirbreidlar: | 30 m keta |
| Posar: | 80 mm dupult 4 mm PET |
| Lemmar: | Injectdoor 5 m² 2000 kg |
| Rist | 1,30 m x 2,00 m avst. Rimar: 60 mm – 35 mm |

Ristin var sett í trolið við einum vinkli uppá 48°. Tá fiskað verður, kann roknast við at hesin vinkul er umleið 43° – 45°.

Høgguslokkur og fiskur varð mátaður úr báðum posunum tey flestu hálini.

Byrjað varð við at hava 60 mm millum rimarnar á ristini. Millumrúmið varð síðani so líðandi minkað við at leggja slangur á rimarnar á ristini. Tá 35 mm vóru millum rimarnar, varð hetta hildið at vera passaligt, tí var tað næstan bert høgguslokkur, sum var í tí niðara posanum. Bert einstakar smáar hýsur og eitt sindur av knurrhana og lítla kongafiski var í saman við høgguslokkinum.

Eisini varð netið frammanfyri ristina broytt, tí at ov nógvur fiskur fór í ovara posan, sum skuldi fara í tann niðara.

**Úrslit:**

Gjørdir vórðu 4 túrar, íalt 59 hál eftir høgguslokki í kantinum á Føroyabanka. Roynt varð í norðara kanti og eystara kanti. Í norðara kanti var eingin høgguslokkur at fáa og sunnarlaga í eystara kanti heldur eingin. Mest var at fáa millum 60°55N og 61°12N. Tað vísti seg eisini, at meira var at fáa um dagin. Í norðara kanti varð nógv meira av smáhýsu enn í eystara kanti.

Veiðan av høgguslokki var brúkilig tveir teir fyrstu túrarnar og at byrja við tann triðja, men so minkaði hon burtur í næstan einki. Tá veiðan minkaði, fall hitin á botni eisini úr 10° – 10,5°C niður í 8,5° - 9°C. Hugsast kann tí, at hitin í sjónum ávirkar høgguslokk eins og fleiri onnur fiskasløg.




*Mynd 2: Stødd av hýsu í hvørjum posa við 35 mm avstandi millum rimarnar á ristini.*
*Niðari posi — Ovari posi*

Rist varð nýtt fyri at sleppa av við mest møguligt av hjáveiðu, serliga smáari hýsu. 35 mm millum rimarnar, sum varð hildið at vera passaligt. Tá fer tað mesta av hýsuni, sum er størri enn 35 cm ikki gjøgnum ristina, men í posan omanfyri, sum ætlandi skal hava størri meskar. Sera lítið var av hýsu, sum var minni enn 35 cm, tí roynt varð í kantinum og har er vanliga lítið til av heilt smáari hýsu.

**Niðurstøða:**
Royndirnar eftir høgguslokki eru sera áhugaverdar, tí at tað kann vera eitt gott íkast afturat tí vanligu veiðuni. 8 tons av høgguslokki, sum er brúkiligt fyri ein túr hevur eitt virði uppá kr. 100.000 við vánaligum prísi uppá 12,50 kr/kg. Um prísurin er 20 kr/kg, sum er meira vanligt, er virði kr. 160.000. Hetta kemur afturat veiðuni, sum skipið annars fær.

Fyri at sleppa undan mest møguligt av óynsktari hjáveiðu, serliga smáari hýsu, eigur ein skiljirist við millumrúmi uppá ikki meira enn 35 mm at verða nýtt, soleiðis at mest møguligt av hjáveiðuni fæst út úr trolinum, meðan fiskað verður.
Fyri at fáa ta ynsktu veiðuna, sum ikki er høgguslokkur, skal ein vanliga loyvdur trolposi, 135/145 mm, festast har fiskurin, sum ikki fer gjøgnum ristina, fer út. Mynd 3 og mynd 4 vísa hvussu posar og rist eru riggaði.

Higartil eru økini, har høgguslokkur hevur verið at fingið bert 2, og tey eru ikki stór. Hesi øki eru í eystara og í sunnara kanti á Føroyabanka. Tí eigur ikki meira enn eitt skip at sleppa at royndarfiska, í øllum førum at byrja við. Heldur ikki vita vit nakað um, hvussu stórt veiðutrýst hesin høgguslokkur tolir, tí hetta er fyrstu ferð at eitt skip hevur gjørt fleiri fylgjandi túrar eftir hesum høgguslokki.

Úti á Bill Baily siga trolarar seg viðhvørt hava fingið fitt av høgguslokki í netinum, tá teir hava verið har. Hetta hevur verið við einum trolposa, sum er 145 mm og tá fáast ongar nøgdir í posan tí meskarnir eru ov stórir. Áhugavert hevði tí verið at vita, um nakað var at fáa harúti við sama reiðskapi, sum roynt varð við í kantinum á Føroyabanka.




**Mynd 3: Rigging av troli og ristum.**




**Mynd 4: Ristsektión og posar.**




Avstand rimar: 60 mm 60/50 mm 45 mm 35 mm

**Mynd 5: Toskur, býti millum posarnar.**




Avstand rimar: 60 mm 60/50 mm 45 mm 35 mm

**Mynd 6: Hýsa, býti millum posarnar.**




Avstand rimar: 60 mm 60/50 mm 45 mm 35 mm

**Mynd 7: Upsi, býti millum posarnar.**




Avstand rimar: 60 mm 60/50 mm 45 mm 35 mm

**Mynd 8: Annað, býti millum posarnar.**




**Mynd 9: Høgguslokkur, býti millum posarnar.**




**Mynd 10: Smáhýsa, býti millum posarnar.**




**Mynd 11: Gulllaksur, býti millum posarnar.**




**Mynd 12: Annað út, býti millum posarnar.**




**Mynd 13: Høgguslokkur, støddarbýti millum posarnar.**




**Mynd 14: Høgguslokkur, støddarbýti báðir posarnir.**


Mynd 14: Hýsa, býti millum posarnar 60 mm rimaavstandur
25,0
20,0
15,0
10,0
5,0
0,0
%
60 mm niðari posi
60 mm ovari posi
16 20 24 28 32 36 40 44 48 52 56 60 64 68 72 76 80
Longd


Mynd 15:Hýsa, býti millum posarnar 45 mm rimaavstandur
25,0
20,0
15,0
10,0
5,0
0,0
%
45 mm niðari posi
45 mm ovari posi
16 20 24 28 32 36 40 44 48 52 56 60 64 68 72 76 80
Longd


Mynd 16: Hýsa býti millum posarnar 35 mm
25,0
20,0
15,0
10,0
5,0
0,0
%
35 mm niðari posi
35 mm ovari posi
16 20 24 28 32 36 40 44 48 52 56 60 64 68 72 76 80
Longd